Føroyar nærri olympiskari viðurkenning

Danski foræstisráðharrin tekur undir við, at Føroyar verða viðurkendar sum eitt sjálvstøðugt OL-land. Hetta ger, at Føroyar helst standa sterkari, tá ÍSF seinni í ár fer at senda Altjóða Olympisku Nevndini eina umsókn um føroyska OL-viðurkenning

OLYMPISK VIÐURKENNING
Magnus Dam
Keypmannahavn

Ikki er óhugsandi, at Merkið fer at veittra á Olympiska Leikvøllinum í Athen, tá ið summar-OL verður í grikska høvuðsstaðnum í 2004.

Í heyst fer ÍSF at senda Altjóða Olympisku Nevndina, IOC, ein umsókn, og líkt er til, at bæði løgmaður og danski forsætisráðharrin fara at mæla nevndini til at loyva Føroyum upp í olympisku familjuna. Og við at hava teir báðar aftanfyri seg, stendur ÍSF sterkari í royndunum at fáa OL-viðurkenning.

Tað var løgmaður, sum í januar eftir áheitan frá ÍSF, heitti á danska forsætisráðharran um saman við sær at stuðla ÍSF í royndunum at fáa viðurkenning frá IOC.

Danski forsætisráðharrin hevur seinastu tveir mánaðirnar umhugsað áheitanina, og eftir at hava kannað málið, er forsætisráðharrin nú til reiðar at stuðla føroyingum.

– Ongar løgfrøðiligar ella aðrar forðingar eru fyri, at eg kann taka undir við, at Føroyar fáa OL-viðurkenning, segði forsætisráðharrin á tíðindafundinum hjá sær týsdagin.

Anders Fogh Rasmussen segði, at hann fer at senda løgmanni eitt »pent« bræv, har hann boðar frá støðuni hjá stjórnini.

Eingin trupulleiki

Ein spurningur hevur verið, um Danmark yvirhøvur kann fara inn og stuðla føroyingum í at fáa OL-viðurkenning, so leingi Føroyar eru partur av danska ríkinum.

Tað eru tey, sum hava sagt, at hetta als ikki kann lata seg gera, meðan onnur hava sagt, at ríkisrættarliga støðan einki hevur við hetta málið at gera. Í ítróttarsamanhangi eru Føroyar at rokna sum ein tjóð á jøvnum føti við allar hinar. Hetta hevur eitt nú verið sjónarmiðið hjá ÍSF.

Og tað er hetta sjónarmiðið, sum Anders Fogh Rasmussen tekur undir við. Hann vil ikki siga, júst hvat fyri løgfrøðiligir spurningar hava verið uppi og vent, meðan stjórnin hevur viðgjørt málið. Hann staðfestir bert, at stjórnin ikki er komin fram á nakrar trupulleikar, sum gera tað ógjørligt at stuðla føroyingum.

Reist á Fólkatingi

Spurningurin um føroyska OL-viðurkenning er eisini reistur í Fólkatinginum. Tað er Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, sum í einum fyrispurningi hevur spurt Anders Fogh Rasmussen, um hann fer at eftirlíka áheitanini frá løgmanni og ÍSF.

Tórbjørn Jacobsen fekk sama svar í Fólkatinginum frá forsætisráðharranum sum á tíðindafundinum: Stjórnin fer at stuðla føroyskari OL-viðurkenning.

Eingin veit, hvussu Altjóða Olympiska Nevndin fer at taka ímóti umsóknini frá ÍSF, men sum løgmaður sjálvur sigur, so hevur tað uttan iva positiva ávirkan, at forsætisráðharrin stuðlar føroysku ætlanunum.

Og tí er tað helst ikki ov tíðliga hjá føroyskum ítróttarfólkum longu nú at fara undir venjingarnar til olympisku leikirnar í Athen í 2004.

Ársaðalfundur

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka

fríggjadagin 22. mars 2002 kl. 17.00

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot um, at nevndin fær heimild til innan endan av mars 2003 at lata bankan ognast upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.
7. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi mánadagin tann 18. mars 2002.

Tórshavn, tann 21. februar 2002.

NEVNDIN

FØROYA BANKI

Góð kort í hondini

ÍSF hevur fingið enn eitt gott kort í hondina, heldur Heðin Mortensen, nú Anders Fogh Rasmussen stuðlar føroyska ynskinum um at fáa viðurkenning í altjóða olympisku nevndini

IOC-VIÐURKENNING
Stefan í Skorini

– Føroyar eru ein sjálvstøðug ítróttartjóð, um man vil tað ella ikki, og okkara sersambond eru góðkend um allan heimin sigur ein avgjørdur Heðin Mortensen, forseti í ÍSF.

Hann heldur, at Føroyar hava fingið enn eitt gott kort í hondina, nú danski forsætisráðharrin hevur boðað frá, at hann stuðlar ÍSF í strembanini eftir viðurkenning í IOC.

– Tað er sera umráðandi, at vit hava fullan politiskan stuðul og hava ein breiðan skara,ið gevur sítt viðmæli, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at tey flestu ítróttarsambondini í Norðurevropa vilja stuðla Føroyum og soleiðis ber til at leggja trýst á olympisku nevndina í hesum spurninginum.

– Vit uppfylla fleiri krøv enn nógv onnur lond,ið hava olympiska viðurkenning og limaskap, og tí eigur tað eisini at bera til hjá okkum.

Umsókn sendast

Enn hevur ÍSF ikki sent sína umsókn avstað. Forsetin sigur, at fram til summarið skal eitt umfatandi lobby-arbeiði gerast, og ein faldari um ÍSF skal prentast og sendast kring heimin.

Henda umsóknin er ein endurnýgging av eini gamlari umsókn, ið varð send IOC í áttatiárunum. ÍSF hevur tó ongantíð fingið noktandi svar frá nevndini, og tí royna menn aftur nú.

Men heldur Heðin Mortensen, at føroysk ítróttarfólk sleppa at luttaka á leikunum í Athen í 2004?

– Tað tori eg ikki at siga her og nú, men lat okkum fyrst fáa limaskap. Eingin ivi er tó um, at vit eiga føroyska ítróttafólk, ið hava eginleikarnar at luttaka á olympisku leikunum.

4 mánaða fongsulsrevsing

RÚSEVNI
Stefan í Skorini

Ein 29 ára gamal maður varð týsdagin dømdur 4 mánaða treytaleysa fongsulsrevsing í Føroya Rætti.

Maðurin varð ákærdur fyri at hava 20 ecstacy pillarar og 20 gramm av amfetamini til egið brúk og til víðari sølu. Maðurin viðgekk seg sekan í hesum ákærum. Maðurin, ið er úr Havn, tók við dóminum. Ákæruvaldið kærdi heldur ikki dómin.

Harumframt er hald lagt á 3.000 krónur, sum rætturin metir, at maðurin hevur forvunnið av rúsevnasølu. Maðurin varð tikin hósdagin av løgregluni, men hann hevur ikki sitið varðhaldsfongslaður hesar dagarnar áðrenn rættarmálið, sum var fyri opnum hurðum.

Ákæruvaldið kravdi ikki, at maðurin skal inn at sita beinanvegin, og tí verður hann innkallaður, tá hann skal sita dómin.

Hetta er fyrstu ferð, at nakar er dømdur fyri ecstacy í Føroyum.

Bilar

Nr. 51 • hósdagur • 14. mars 2002 • 76. árg.

Fiat Stilo - merktur av gjøgnumførdum kvaliteti

Fiat Stilo er komin á marknaðin í tveimum útgávum, við 3 og 5 hurðum, ið ikki eru heilt eins

Stilo við 3 hurðum. Designi á báðum útgávunum er ikki heilt eins. Stóra aksulfrástøðan ger sítt til at so gott beinpláss er aftan og framman

Stilo við 5 hurðum. Í báðum útgávunum er talan um rúmligar 5 persónabilar

Fiat er komin á marknaðin við heilt nýggja bilinum, Fiat Stilo, ið skal avloysa Fiat Bravo og Brava. Stilo verður gjørdur í tveimum ymiskum útgávum við 3 og 5 hurðum. Kvaliteturin og útgerðin er á sera høgum støði

BILAR
Magnus Gunnarsson

Stilo er ein størri og rúmligari bilur enn forgangarnir. Í báðum útgávunum er talan um rúmligar 5 persónabilar, har tey ferðandi á baksetrinum hava møguleika er at stilla setrini bæði aftur og fram og at stilla stólaryggin. Stóra aksulfrástøðan ger sítt til at so gott beinpláss er aftan og framman.

Góður kvalitetur innan

Kabinan er merkt av at nógv er gjørt burturúr kvalitetinum, t.d. á setrunum og instrumentborðinum. Man situr høgt í bilinum, ið hevur gott pláss uppeftir, í stíl við bilar sum Peugeot 307. Baksetrið kann flytast 16 cm aftur og fram. Viðførisrúmið er 370 litrar, tá setrið er heilt frammi.

Active, Dynamic og Abarth

Stilo fæst í trimum ágávum hvat útgerð viðvíkur: Active, Dynamic og Abarth. Allar útgávurnar hava nógva trygdarútgerð, so sum 6 airbags, ABS bremsuskipan við t.d "traction controll" og bremsuassistenti, antispinn, og ESP stabilitetsskipan sum standard. Umframt ta vanligu útgerðina fæst Stilo eisini við t.d Xenon forlyktum, el-setrum og regnsensorum.

Lættur at stýra

Koyrieginleikarnir eru heilt í topp. Við at trýsta á ein knott á instrumentborðinum kunnu stýrieginleikarnir broytast soleiðis at bilurin verður lættari at stýra. Hetta er sera væl egnað til býkoyring, við tað at bilurin verður lættur at parkera har sum trongt og lítið pláss er. Stilo fæst við hesum bensinmotorum: 1.6 litur við 103 hk, 1.8 litur við 133 hk og 2.4 litur við 170 hk sum bert fæst í Abarth útgávuni. Í nærmastu framtíð verða eisini 1.9 litur JTD dieselmotorar við ávíkavist 80 og 115 hk á skránni.

Kabinan er merkt av at nógv er gjørt burturúr kvalitetinum

Fiat Stilo 1,6 Dynamic 5/h

Motorurin	1.6 litur 16V bensin 103 hk
0-100 km/t	10,9 sek.
Bensinnýtsla	13,5 km/l
Dekkstødd	195/65-15
Stødd og vekt	
Longd	425 cm
Breidd	176 cm
Hædd	153 cm
Eginvekt	1200 kg
Viðførisrúm	370 litrar
Prísur	kr.186.600
Søluumboð	Bilfríðkan Smiðjugerði FO-100 Tórshavn Tel. 317300 / 217300 www.bilfridkan.fo